## PÁSKAMØTIR í Nerija á Skála og í ítróttarhøllini í Runavík

### Hesi møtir verða í Nerija á Skála

**Hóskvøldið** **kl. 19.00**
**Fríggjakvøldið** **kl. 19.00** – Páll Poulsen úr Tórshavn talar

### Hesi møtir verða í ítróttarhøllini í Runavík

**Fríggjakvøldið** **kl. 22.00** – Ungdómsmøti – Símun í Túni, Toftir talar
**Leygarkvøldið** **kl. 19.00** – Møti – Dia á Roykheyggi, Runavík og Oddur Lamhauge, Saltangará tala
Barnamøti er samstundis
**Leygarkvøldið** **kl. 22.00** – Ungdómsmøti – Tom Roberts úr Bahama talar
**Sunnudagin** **kl. 11.00** – Minnismáltíð Harrans – Jákup Hansen, Søldafjørður talar Barnamøti er samstundis
**Sunnudagin** **kl. 16.00** – Møti – Tom Roberts úr Bahama talar
Barnamøti er samstundis
**Sunnukvøldið** **kl. 19.00** – Møti - Rógvi P. Jacobsen, Toftir og Anita Tausen, Toftir tala
Kvinnukórið og gentukórið úr Nebo luttaka við sangi
**Sunnukvøldið** **kl. 22.00** – Ungdómsmøti – Jógvan Jacobsen, Argir talar

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

**Vegna samkomurnar á Skálafjørðinum:**
Nebo á Toftum, Berøa í Saltangará, Elim í Søldafirði og Nerija á Skála.

## BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



**Ring og hoyr nærri**

miðlahúsið
í Vágsbotni

· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO
Sosialurin

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**

Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Telefon 360660 · Telefax 318624
Teldupostur: skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: Kl. 08.00 – 15.00

HF

# Kundi tú hugsað tær at undirvíst í Hoydølum?

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða frá 1. august 2011 at rokna **5-8 føst størv** leys at søkja sum adjunktur/lektorur við faksamanseting ætlað til lærugreinaraðið í studentaskúlum og HF-skeiðum. Søkt verður eftir lærarum við eini samanseting av hesum lærugreinum:

**Alis-evnafrøði, evnafrøði, danskt, enskt, føroyskt, ítróttur, lívfrøði, religión, spanskt, støddfrøði, søga, teldufrøði og týskt.**

Harumframt eru **12-16 ársvikariat og/ella tímalærarastørv** í lærugreinunum:

**Alisfrøði, alis-evnafrøði, danskt, enskt, fornaldarfrøði, franskt, føroyskt, leiklist, religión, sálarfrøði, spanskt, støddfrøði, søga, teldufrøði, tónleikur og týskt.**

Ársvikariat kunnu eisini søkjast í hesum lærugreinum saman við eini av lærugreinunum, sum nevndar eru undir føstu størvunum.

Umsøkjari, ið ikki hevur lokið prógv í námsfrøði fyri setanardagin, skal taka lut í innleiðsluskeiði í námsfrøði, sum Mentamálaráðið skipar fyri í august 2011. Nýsett starvsfólk skulu sambært føroyskari kunngerð um námsfrøði hava staðið námsfrøðiliga útbúgving í seinasta lagi tvey ár eftir setanardagin.

Førleikakrav annars er akademisk kandidatútbúgving í minst einari av teimum lærugreinum, ið lýst verður eftir ella aðra tilsvarandi útbúgving. Umsøkjarar, ið enn ikki hava staðið endaligt prógv, men vænta at gera tað, áðrenn skúlaárið 2011-2012 byrjar, kunnu eisini søkja.

Í sambandi við starvsetanina leggur skúlin dent á, at umsøkjarar hava kunnleika um føroyskt mál og føroysk samfelagsviðurskifti, ella at umsøkjarar eru áhugaðir í at ogna sær hetta innlit. Skúlin leggur somuleiðis dent á góð samstarvsevni, og at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, kunningartøkni og nýggir arbeiðshættir eru týðandi tættir.

Gjørt verður vart við tveyárasáttmálan, ætlaður umsøkjarum við vantandi føroyskum málførleika og vantandi kunnleika um føroysk samfelagsviðurskifti. Tað vil siga, at umsøkjarin verður settur í tíðaravmarkað starv fyri tvey ár. Skúlin rindar kostnaðin hjá umsøkjaranum fyri flyting og ferð fram og aftur millum verandi bústað og Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Skúlin endurrindar í mesta lagi 30.000 kr. fyri flyti- og ferðaútreiðslur hvønn vegin – gevið gætur – upphæddin er skattskyldug. Ætlar umsøkjarin at halda fram í starvinum eftir tveyáraskeiðið, skal umsøkjarin søkja starvið av nýggjum á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar. Áhugaðir kunnu venda sær til skúlan.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um skúlans stevnumið, um teir venda sær til leiðslu skúlans ella kunna seg á heimasíðu skúlans: www.hoydalar.fo

Umsókn á oyðublaði frá MMR, YF ella GL verður stílað og send til

*Føroya Studentaskúli og HF-skeið,*
*att.: Mikkjal N. Helmsdal, rektari,*
*Hoydalar,*
*Sanatoriivegur 1,*
*FO – 188 Hoyvík, Føroyar*

Ella á teldupost:
*mikkjal.helmsdal@skulin.fo*

og skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 2. mai 2011.

Avrit av próvtøkuskjølum ella úrskrift úr próvtøkuprotokoll, CV og møgulig ummæli/viðmæli frá fyrri starvssetanum skulu sendast saman við umsóknini.

Setanarsamrøður fara fram frá umleið 9. mai og frameftir.